| LD-Rundskriv | Dato 4. oktober 1998 | Ár-nr. **1998-2** |
|---|---|---|
| Til: **Stovnar hjá landinum** | LD j. nr. 8475-00-1/98 | Síða |
| Heiti: **Um frí arbeiðsklæði og persónliga verndarútgerð** | | |

**§ 1.** Hetta rundskriv geldur fyri allar stovnar, grunnar o.o. har Fíggjarmálastýrið hevur málræði at áseta lønar- og setanarviðurskifti

**§ 2.** Rundskrivið fevnir um arbeiðsklæði og persónliga verndarútgerð, sum stovnurin áleggur sínum starvsfólki at nýta.

**§ 3**. Stovnurin kann lata frí arbeiðsklæði og persónliga verndarútgerð, um tað er

1) avtalað í sáttmála við fakfelag,

2) er kravt í lóggávu ella

3) av rakstrarligum ávum, tí tað er neyðugt at starvsfólkið ber eyðkennisbúna, so viðskiftafólk sær, hvør er starvsfólk, (t.d. bil- og bussførarar, eftirlits- og vaktarfólk, og avgreiðslufólk).

**§ 4.** Arbeiðsklæði og persónlig verndarútgerð mugu bara nýtast í arbeiðinum, og eru ogn hjá stovninum. Tá tey ikki verða nýtt meira, annaðhvørt tí tey eru slitin, ella tí starvsfólkið fer úr tænastu, skulu tey latast stovninum aftur.

**§ 5.** Teir stovnar, ið lata frí arbeiðsklæði ella persónliga verndarútgerð, skulu gera eina innanhýsis reglugerð, sum skal hava ásetingar um

1) hvørjair starvsbólkar hon fevnir um,

2) hvat slag av klæðum ella verndarútgerð verða latin,

3) hvussu ofta klæðini ella verndarútgerðin verða skift út, og

4) hvør umsitur skipanina.

*Stk. 2.* Reglugerðin skal góðkennast av tí aðalstýri, sum stovnurin hoyrir undir.

*Lønardeildin, 4. oktober 1998*

Thomas Magnussen